## Smáir bankar dýrir

Brúkararáðið í Danmark fýlist nú á, at fleiri av teimum smáu bankunum hava ikki lækkað rentuna á eitt nú billánum, hóast rentan hjá Tjóðbankanum er lækkað fleiri og ferðir og er metlág nú. Niðurstøðan hjá ráðnum er, at viðskiftafólkini verða snýtt. Carsten Holdum, sum er leiðandi løgfrøðingur hjá Brúkararáðnum, sigur við Politiken, at viðskiftafólkini hjá teimum smáu bankunum bera kostnaðin av vánaligum rakstri og ivasomum íløgum. Fleiri av bankunum viðganga, at teir halda rentuni uppi fyri at fáa tapini innaftur.



## Ávirkar ikki Icesave

Tað fær eftir øllum at døma onga ávirkan á samráðingarnar millum íslendskar og niðurlendskar myndugleikar um Icesave-málið, at stjórnin í Niðurlondum noyddist at leggja kongin leygardagin. Tað skriva íslendskir fjølmiðlar og vísa til niðurlendska sjónvarpið RTL, sum hevur sagt, at stjórnarkreppan fer ikki at ávirka niðurlendsku støðuna til Icesavemálið. Niðurlendska stjórnin fór í upploysn, tí flokkarnir kundu ikki semjast um, nær hermenninir í Afghanistan skulu takast heimaftur. Eftir stýrisskipanarlógini skal val haldast í seinasta lagi 83 samdøgur eftir, at stjórnin er farin frá.

### Úr bókini: Villini súgdýr í Útnorðri stendur um roysning:

Roysningur er størsti kópur í Norðurhøvum. Brimilin verður upp í 360 cm og vigar 1,9 tons, og opnan upp í 280 cm long og kann viga upp í 1,2 tons. Roysningur hevur stórar, tættar kampar, ið eyðkenna hann. Bæði á brimli og opnu vaksa tøkutenninar í yvirkjaftinum, til tær eru upp í ½ metur langar høggtenn, longri á brimlinum. Høggtenninar eru hent amboð hjá roysningi, tí umframt at brúka tær at verja seg við, brúkar hann tær eisini at krøkja seg upp á ísin við. Roysningur er snøggur, gulmorreyður og hevur ógvuliga tjúkka húð, sum um nakkan og herðarnar kann vera 2-4 cm tjúkk. Summir gamlir brimlar hava naknar blettir.

Roysningur livir av botndýrum, sum hann finnur fram á við kampunum. Hann kavar eftir føðini, tó ikki meira enn á 100 m dýpi. Føðin er næstan bara skeljadýr, sum hann er førur fyri at súgva burtur úr skeljunum, nakað av øðrum ryggleysum botndýrum, og hann tekur eisini ringkóp, granarkóp og grønlandskóp.

Í arktis er roysningur ímillum 55°-81°N. Ein stórur stovnur er í Norðurkyrrahavi. Í Norðurhøvum eru teir flestu millum Kanada og Grønland, ein lítil stovnur er undir Eysturgrønlandi, og so eru eisini nakrir fáir túsund roysningar úti fyri Norðurrusslands strondum. Nú á døgum (1993) er eisini aftur ein stovnur, sum er í vøkstri, undir Svalbarði og Frans Jósefslandi. Roysningur kann reika so langt suður sum til Norðurspania.



*Norðlýsið var sunnumorgunin í Árnafirði og fekk nakrar góðar myndir av roysninginum*

# Snorkini hoyrast langan veg

**Seinastu dagarnar hevur ein gamal roysningur hildið til í Árnafirði**

GESTUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tá ið tað lýsti sunnumorgunin, sóu árnfirðingar ein stóran roysning liggja uppi á landi, og seinni fór hann so á sjógv aftur. Helst hevur hann ligið í fjøruni ein stóran part av náttini.

Síðan hevur hann av og á ligið og sovið uppi á landi, og annars svimur hann runt á víkini.

Í dag hava fleiri fólk koyrt sær ein túr til Árnafjarðar fyri at síggja roysningin. Men roysningin er varin og smýgur á sjógv, tá ið fólk nærkast.

Úr Árnafirði frætta vit, at tá ið soysningurin er uppi á turrum, svevur hann alla tíðina, og snorkini frá honum hoyrast langan veg.

**Gamal brimil**

Fólk frá Náttúrugripasavninum høvdu í morgin enn ikki verið í Árnafirði og hugt at roysninginum, men út frá myndunum, sum Norðlýsið tók sunnumorgunin, heldur lívfrøðingurin Bjarni Mikkelsen seg kunna siga, at roysningurin er ein gamal brimil, minst 25 ára gamal, og hann er sera væl í holdum.

Hetta er 14. ferð síðani 1895, at Náttúrugripasavnið hevur skrásett roysning. Allar fráboðanir hava verið í vetrarhálvuni frá september til apríl. Aloftast ein og ein, men tvær ferðir hava tveir verið í senn, og allir hava verið ungir roysningar, ið eru farnir á strok.

Tað eru mest teir ungu roysningarnir, sum eru forvitnir og fara út at fjakka, men brimilin á Árnafirði skuldi verið komin um tann aldur.

Bjarni Mikkelsen heldur tó ikki, at hesum gamla roysninginum baga nakað. Hann er helst bara farin av kós, men fer óivað at venda norðureftir skjótt.

Tað er einki løgið í, at hann leggur seg upp á land. Vanliga umhvørvi hansara er uppi í ísinum, og roysningarnir plaga at fara upp á ísin at leggja seg.

Hann er varin, men ikki styggur, tí her á leiðum hevur hann ongan naáttúrligan fígginda.

# Álopin í bili sínum

**Ein ungur maður varð sunnunáttina í Klaksvík handtikin og skuldsettur fyri at hava sligið og sparkað ein annan mann**

HARÐSKAPUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í Klaksvík standa um kvøldið ofta fleiri bilar við posthúsið, og fólk fara út at práta.

Soleiðis var leygarkvøldið og út á sunnunáttina.

Í einum av bilinum sat bilførarin við opnari hurð, og tá kom ein maður gangandi. Maðurin var ikki blíður, hann slerdi hin fleiri ferðir í andlitið og sparkaði hann eisini í síðuna.

Tann álopni maðurin fór beinanvegin til politiið, sum fór at leita eftir hinum manninum, og teir funnu hann inni í einum vertshúsi.